FELAGIÐ LÍNUSKIP

Fíggjarmálaráðið
FO-100 Tórshavn
fmf@fmf.fo

Sandavágur, 15. mars 2023.

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um broyting av veiðigjøldum, tykkara mál nr. 23/03971, dagf. 9. mars 2023:

Hoyringsfreistin til hetta lógaruppskotið er bara ein vika. Vit ynskja at vísa á, at onki í lógaruppskotinum hevur skund. Tí er tað ørkymlandi, at hoyringsfreistin er so stutt. Lastverk er hastverk, og av tí sama meta vit, at hesar ætlaðu broytingarnar eiga at viðgerast við tí tign og virðing, sum myndugleikarnir eiga at hava fyri teimum, sum virka undir lógunum – teimum verandi og komandi.

Okkara meting er, at hetta lógaruppskotið hevur so mikið stórar broytingar við sær, at tað eigur antin at vera tikið aftur, ella eigur ein rímilig og hóskandi tíð at avsetast til viðgerð av hesum.

Reiðaríini, sum reka línuskip, hava seinstu árini gjørt íløgur í nýggjari og betri skip, men framvegis hava líkindi ikki veri at bygt nýggj línuskip til føroyska flotan.

Tey skipini, sum nú eru í vinnu í bólki 3, eru hesi:

Frystiskip:

1. Eivind VA 132 (1988)
2. Jákup B (1989)
3. Jógvan I FD 710 (1998)
4. Kambur FD 454 (1998)
5. Klakkur KG 9 (2010)
6. Pison KG 476 (1987)
7. Polarstjørnan KG 349 (1970)
8. Sandshavið SA 499 (1988)
9. Stapin FD 32 (1989)
10. Vesturhavið VN 700 (1987)

Feskfiskaskip:

11. Kvikk KG 477 (1987)
12. Núpur KG 910 (1960)

Øll frystiskipini eru keypt ella umbygd 2014 og frameftir. Tó kom Polarstjørnan í 2001. Onki nýtt línuskip er bygt til eitt føroyskt reiðarí síðani 1988.

Tá ið línuskipini fingu kvotu á Flemisk Kap og í Eysturgrønlandi, kom gongd á útskiftingina av teimum gomlu skipunum við nýggjari skip. Miðalaldurin lækkaði eftir stuttari tíð úr uml. 43 árum til uml. 35 ár, men í løtuni hækkar miðalaldurin aftur við einum ári hvørt ár.

FELAGIÐ LÍNUSKIP

Í 2020 fingu línuskipini makrelkvotu. Hendan hevur verið sera hent at hava við hondina, tí inntøkan til bæði skip og manning hevur gjørt, at tað eisini hevur verið lættari at fingið manning og fígging til útskifting av fleiri skipum, sum vit hava sæð tey seinastu árini. Um línuskipini nú skulu rinda veiðigjald av hesum makrelkvotunum, so verður at kalla onki eftir til reiðaríini, tá ið manningarnar hava fingið sín part.

Tað er ongin loyna, at bæði manningarnar og reiðaríini høvdu líka fegin ynskt sær kvotur at fiska heldur enn makrel at selja, men nú hevur støðan verið hendan í nøkur ár, og makrelkvoturnar hava avgjørt stuðlað undir tí menning, sum línuskipini hava havt. Tí vísa vit eisini á tær óhepnu ætlanirnar fyrst at áseta tilfeingisgjald á makrelkvoturnar og síðani at seta brúksskyldu á tær hjá línuskipunum, um ikki landsstýrið megnar at útvega somu skipum nýggjar kvotur í staðin.

Broytingar í avreiðingarvirðunum hjá línuskipunum frá 2014 til 2022 vera víst niðanfyri:

- 2014 fiskaðu 15 línuskip fyri 174 mió. kr. – miðalveiða pr. skip var 11,6 mió. kr.
- 2022 fiskaðu 12 línuskip fyri 448 mió. kr. – miðalveiða pr. skip var 37,3 mió. kr.

Tað er eyðsæð, at skipini hava havt ein betri rakstur, síðani tey flestu løgdu um frá feskfiskaveiðu til at frysta umborð. Umframt betri skip, so hava tey eisini fingið øktar kvotur á Flemish Kap, Grønlandi og eina betri samanseting av íslandskvotuni. Flestu reiðaríini hava havt eitt nøktandi yvirskot tey seinastu árini, men tó er langt á mál, áðrenn grundarlag er at byggja nýggj skip, tí yvirskotini hava enn ikki svarað til øktar kapitalútreiðslur.

Tó eru nakrir tankar búnaðir hjá summum reiðaríum, at vit nú kunnu umhugsa at byggja nýtt. Hetta er m.a. tí, at vit hava kent lóggávuna, sum hevur givið skipunum hesar støðugu møguleikarnar at royna á bæði nær- og fjarleiðum umframt undir Føroyum.

Reiðaríini vita, at tað verður seinur dagur, áðrenn vit fáa tryggar karmar at arbeiða innanfyri, men okkara ynski hevur í nógv ár verið, at vit fáa støðugar karmar. Tað halda vit ikki vera ov nógv at biðja um.

Frá 2007, tá ið tágaldandi lóggáva bleiv uppsøgd, og meira enn 10 ár fram, bleiv onki nýtt skip kontraktað til Føroya. So kom ein nýggj lóg – sjófeingislógin – og hendan hevur so havt nakrar fyrimunir og vansar við sær, sum reiðaríini laga seg eftir. Men longu nú er aftur ætlanin at broyta veiðugjøldini, at avtaka undantakið fyri heimaflotan osfr. Hetta ger, at vit arbeiða aftur nú undir óstøðugum karmum – teir ótryggu koma av sær sjálvum, men teir støðugu kunnu tey fólkavaldu stýra.

Ongin óvanligur vinningur er í bólki 3, og sokallaða tilfeingisrentan skal vera vælkomin inn í bólkin, men higartil hava vit ikki sæð hana. Okkara niðurstøða er, at tilfeingisgjøld eiga ikki at leggjast á tann partin av flotanum, sum nýliga hevur fingið ein lítlan vinning í raksturin. Og tann parturin av flotanum, sum hevur tilfeingisgjøld at gjalda, eigur at merkja, at hesi gjøldini eru hóskandi, so pláss verður fyri íløgum í nýggj skip.

FELAGIÐ LÍNUSKIP

Tað hevur eisini stóran týdning, at bæði reiðaríini og manningarnar vita og skilja, hvussu eitt møguligt tilfeingisgjald skal útroknast. Vit loyva okkum at minna á eina lóg frá 2015, sum man vera millum tær mest einføldu í føroyskum jura-smíði. Tað er lóg nr. 159 frá 24. desembur 2015 um veiðugjald á svartkjafti, har §1 er soljóðandi:

> **§ 1.** Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi skal rinda eitt veiðigjald, sum verður lagt á hvørt fiskað kilo í rundari vekt av svartkjafti, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til svartkjaft í 2015.
> *Stk. 2.* Veiðigjaldið er kr. 0,20 fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av svartkjafti.
> *Stk. 3.* Veiðigjaldið fer í landskassan.

Felagið Línuskip tekur her ikki støðu til, um 20 oyru pr. kg er rætta upphæddin, men vit vísa á, at í 2015 bar til at gera einfaldar lógir og kunngerðir – av tí sama eigur enn at bera til at gera lógarverkið so einfalt, at tað bæði er lætt at gera, skilja og fyrisita. Hesar treytirnar lýkur nýggjasta uppskotið um veiðgjøld ikki.

Møguligar broytingar í fortreytunum at reka línuskip eiga at taka hædd fyri teimum íløgum, sum eru gjørdar, og nýggj ella nýggjari skip mugu altíð leggja eina fíggjarætlan fyri teir peningastovnar, sum luttaka í fíggingini. Tí er tað sera óheppið, at ætlaðar lógarbroytingar ávirka ársúrslitið hjá hvørjum einstøkum reiðaríið so nógv, sum verandi lógaruppskot leggur upp til.

Vit meta ikki, at sjófeingislógin skal broytast munandi eftir hvørt løgtingsval, hóast verandi lógaruppskot ætlast at taka hædd fyri broytingum í rakstrarútreiðslunum hjá skipunum. Okkara meting er, at sveiggini í útreiðslunum og fiskaprísunum hava verið so mikið stór tey seinastu árini, at tað er nærum ógjørligt at leggja eina fíggjarætlan, sum heldur. Av tí sama er eisini torført at rokna eina sokallaða tilfeingisrentu, sum er rætt – ella rætt í eitt langt áramál, tí sveiggini á bæði inntøku- og útreiðslusíðuni eru nóg stórar avbjóðingar í sjálvum sær.

Sum dømi um øktar útreiðslur kunnu vit nevna, at miðalprísurin á olju í 2019 var uml. 4,19 kr/l hjá onkrum skipi. Í februar-mars 2023 er miðal oljuprísurin 8,47 kr/l hjá sama skipi. Økingin er 202% eftir uml. tveimum árum.

Nakrir fiskaprísirnir eru eisini øktir í hesum tíðarskeiði, men í tíðarskeiðnum desembur 2022 til mars 2023 eru aðrir fiskaprísir falnir við 35%. Renturnar eru hækkandi, og bert í 2022 og 2023 eru tær hækkaðar munandi. Hetta eru ótryggir karmar, sum reiðaríini laga seg til og liva við, men tað er tungt at laga seg til ókendar broytingar og óstøðugt politiskt landslag, alt eftir, um løgtingsval hevur verið ella ikki.

Felagið línuskip heitir tí staðiliga á fíggjarmálaráðið um at afturkalla verandi lógaruppskot um økt tilfeingisgjald, har undantøkini fyri heimaflotan eisini skulu falla burtur.

FELAGIÐ LÍNUSKIP

Í staðin eiga vit í felag at brúka neyðuga tíð at lýsa sokallaðu tilfeingisrentuna, semjast um útrokningarhættir, leggja einfaldar útrokningar til grund fyri møguligum tilfeingisgjøldunum – og mest av øllum eigur breið politisk semja at vera um teir støðugu karmarnar, sum vit hava eftirlýst í eitt drúgvt áramál og framvegis eftirlýsa.

Um áhugi er at síggja fleiri útgreiningar um sama mál, so koma vit fegin á fund at greiða frá okkara sjónarmiðum.

Felagið Línuskip

Hálvdan Gudmundsen
formaður